

Deepsea Horizon-vanlukkan. Mynd: EPA/US COAST GUARD

# BP hevur góðtikið at rinda 126 milliardir krónur í endurgjaldi

**Jógvan Hugo Gardar**

02.07.2015 - 16:43

Oljan.fo

Í USA hava statirnir Florida , Alabama, Mississippi og Louisiana í dag gjørt semju við oljufelagið BP um at BP skal rinda teimum 18,7 milliardir dollarar, tað svarar til 126 milliardir danskar krónur.

Endurgjaldið er fyri dálkingina sum stóðst av risa oljulekanum, tá 473 milliónir litrar av olju fór í havið tá boripallurin Deepwater Horizon fór í luftina í apríl 2010. 11 av teimum sum vóru á boripallinum doyðu.